# Bilar

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo





*Tesla Model S koyrir frá 0-100 km/t upp á 6 sekund og koyrir 480 km upp á eina løðing*

# STÓRUR EFTIR-SPURNINGUR EFTIR MODEL S

**Við næstan 300 hk og 0-100 km/t upp á 6 sekund og eini toppferð uppá næstan 200 km/t verður amerikanski Tesla Model S ein kollvelting innan elbilar. Bilurin koyrir 480 km upp á eina løðing, og battaríini kunnu løðast upp á einans 45 minuttir**

Tað sær út til at Tesla Motors í USA yvirhálar teir flestu bilframleiðararnar hvat elbilum viðvíkur.

Tesla Roadster hevur verið á marknaðinum í eina tíð, og komandi ár kemur Tesla Model S, sum er ein sedan við fýra hurðum. Talan er um ein rættiliga stóran bil. Í støð og vekt er hann sum ein Audi A6, næstan 5 metrar langur og vigar umleið 1.800 kg.

Model S, sum hevur 292 hk el-motor, koyrir frá 0-100 km/t upp á 6 sekund og kann koyra 480 km upp á eina løðing. Battaríini kunnu lynløðast upp á einans 45 minuttir.

Amerikanska verksmiðjan Tesla Motors Inc. varð stovnað í 2003 av verkfrøðingum frá háteknologisku háborgini í USA, Silicon Valley. Høvuðssætið hjá Tesla Motors er í Palo Alto í Kalifornia. Bilverksmiðjurnar Daimler AG og Toyota hava keypt seg inn í Tesla, eins og Tesla samstarvar við Panasonic um gransking og menning av battaríum.

Stórur eftirspurningur er eftir Tesla Model S, sum eftir ætlan kemur á marknaðin í 2012.



*Tesla Model S innan*



*Nikola Tesla (1856-1943)*

## Nikola Tesla

Bilarnir eita eftir serbiska el- og maskinverkfrøðinginum Nikola Tesla, sum eisini var uppfinnari.

Hann var føddur í Serbia í 1856 og flutti til USA 1891, har hann búsettist. Nikola Tesla er best kendur fyri sína kollveltandi menning innan elektromagnetismu fyri umleið hundrað árum síðan.

Nikola Tesla andaðist í 1943, 86 ára gamal.